| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 06. oktober 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 08/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 06. oktober kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 30. september 2016 um innkalling til fundar. Talan er býráðsfundin 29. september 2016, sum varð avlýstur vegna serligar umstøður og har nýggjur varð ásettur til at verða hildin 06. oktober 2016.

**Møttir vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Atli Larsen
Árant Berjastein
Jann N. Toftegaard

Eyðun á Lakjuni hevur við telduposti, dagfestum 04. oktober 2016 boðað frá, at hann av serligum orsøkum hevur forfall til fundin. Vegna tess møtti varalimurin á lista B Atli Larsen á fundinum.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 59/2016.**

**2. viðgerð av eykajáttan til bátahavnina.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá vinnunevndini, dagfest 16. august 2016, hvar greitt verður frá, at sambært fyrisitingini er staðfest, at eingin játtan til til elarbeiðið vm. í bátahavnini men bert til útskiftan av bátabrúgvum og arbeiði við grótkastinum.

Vinnunevndin loyvir sær tí at heita á fíggjarnevndina/býráðið um at veita eina eykajáttan til arbeiðið í bátahylinum upp á kr. 600.000,00.

Eykajátanin umfatar:
1. Tilboð nr. 20214 frá P/F JT Electric áljóðandi kr. 320.000,00 uttan meirvirðisgjald.
2. Víðkaða íbinding frá SEV á kr. 90.955,00 uttan meirvirðisgjald.
3. Kostnaður arbeiði hjá Green Marine við vatn og streymstandarar kr. 94.000,00 uttan meirvirðisgjald.
4. Kostnaður arbeiði P/F Petur Larsen landgangir + armar kr. 87.700,00 uttan meirvirðisgjald.

Biðið verður um, at málið kemur fyri á fyrst komandi býráðsfundi.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 31. august 2016 og staðfesti, at eingin játtan er til omanfyri nevndu arbeiði, og at neyðugt verður við eykajáttan, um so verður at arbeiðini skulu verða sett í verk.

Nevndin mælir einmælt býaðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 600.000,00 til íløgur í bátahavnina – Fuglafjarðar havn rakstrarstað 751 konto 3142-00, soleiðis at játtanin til íløguma verður hækkað úr kr. 4,8 mió upp í kr. 5,4 mió, hetta vísandi til § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Vísandi til § 41, stk 2 í nevndu lóg verður eykajátanin upp á kr. 600.000,00 fíggjað sambært § 25 "Gjaldføri"inntøka av partafelagsskatti", har avsettar eru kr. 11,5 mió á fíggjarætlan kommununar fyri 2016, men at væntað verður sambært metingum, at partafelagskatturin verður nakað hægri enn mett.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær upp á kr. 600.000,00, sum hevur eina beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu henda skal verða fíggjað.

Í hesum máli, eins og í øðrum verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum um nevndarformenn, at hesir ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

Málið hevur verið til 1. vðgerð á býráðsfundi 08. september 2016 og varð samtykt at taka undir við tilmælunum frá vinnunevndini og fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi.

**Avgerð:**
Samtykt varð at veita eykajáttanina til bátahavnina upp á kr. 600.000,00 sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini, soleiðis at eykajáttanin á rakstrarstaði 751 – konto 3142-00 verður fíggjað av innistandandi § 25 gjaldføri – meirinntøka av partafelagsskatti. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Atli Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 60/2016**

**Uppskot til broytan av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.**

Fyrisitingin hevur við skrivi, dagfestum 30. september 2016 heitt á býráðið um at gera broytingar í kommunustýrisskipanina fyri Fuglafjarðar kommunu fyri 7. Part "samsýningar vm". § 34, serliga við atliti til 1. og 2. petti, sum lýsir samsýning og eftirløn til borgarstjóra og 10. og 11 petti um samsýningar til nevndarformenn og nevndarlimir.

Sambært galdandi kommunustýrisskipan, sum sett varð í gildi frá 01. juli 2001 at rokna so fær borgarstjórin samsýning og eftirløn eftir somu reglum sum landsstýrismaður, hetta vísandi § 1, stk. 2 í LL nr.10 frá 08. januar 1993 við seinni broytingum. Henda LL er farin úr gildi.

Sambært nýggjari løgtingslóg nr. 71 frá 18. mai 2014 um samsýning og eftirløn til landsstýrismenn, so er tann broyting í vísandi til § 1, stk. 7, at landsstýrismaður fær 15% í eftirlønargjaldi, somuleiðis sum lønin sambært § 1 110% av lønarflokki 40 í tænastumannasáttmálanum.

Sostatt fær landsstýrismaður, sum sitið hevur í 8 ár ikki sum fyrr fulla tænastumannpensjón 60% av lønini, tá ið viðkomandi kemur til eftirlønaraldur.

Broytingin í kommunustýrisskipanini kemur at bera við sær, at borgarstjórin fær í fulltíðarstarvi sínum samsýning ájavnt við 37. lønarflokk sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins, og at tað í hesum sambandi verður víst til § 10, stk. 2 4) í kunngerð nr. 93 frá 09. september 2014 um samsýning o.a. sambært løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Tá ið borgarstjóri fer frá vegna aldur fær hann eftirløn eftir reglum í § 14 1) og 2) í kunngerð nr. 93 frá 09. september 2014 um samsýningar sambært kommunustýrislógini fær hann eftirløn, sum er 15% av av samsýningini sambært 37. Lønarflokki í tænastumannasáttmálanum.

Eisini verður teksturin sambært § 34, 7. petti um borðfæ strokin, sí annars nýggju lógina um landsstýrismenn, har tað í § 1, stk. 3 stendur, at endurgoldið verður móti kvittanum upp til kr. 10.000,00 pr. mánaða fyri húsaleigu, el og hita.

Mælt verður til, at broytingin kemur í gildi 01. januar 2017.

Tað skal verða upplýst, at uppskotið til broytingina er sent løgfrøðingi kommununar til møguligar viðmerkingar/broytingar, og kemur hann við sínum uppriti í vikuskiftinum. Hetta upprit fyriliggur og er sent býráðslimum við telduposti 03. oktober 2016.

Aftrat omanfyri nevndu broytingum, so verða upphæddirnar til nevndarformenn og nevndarlimir stroknar, við tað at hesar eru ásettar samsvarandi kunngerð fyri føstu nevndirnar, meðan limir í øðrum nevndum eftir § 36 í kommunulógini verða veittar samsvarandi galdandi fundartakstum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá fyrisitingini til broytingar í § 34 um samsýningar, eftirlønir vm., og at beina málið til 2. viðgerð á komandi býráðsfundi (9-0). Við tað at broytinmgarnar skulu hava 2 viðgerðir, so skulu í minsta lagi verða 14 dagar ímillum viðgerðirnar.

**Mál nr. 61/2016.**

**Umsókn frá Fa. Poul Joensen um byggiloyvi til bygning á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Fa. Poul Joensen, dagfest 06. september 2016 um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 871bm á Kambsenni 11 á ídnaðarøkinum á Kambsdali.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundum í vinnunevndini og i teknisku nevndini, og mæla nevndirnar býráðnum til, at byggiloyvi verður givið soleiðis, at meira fullfíggjaðar tekningar, sum tekniska deildin kann góðtaka, fyriliggja.

**Avgerð:**
Tilmælini vórðu samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin var Jann N. Toftegaard ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 62/2016.**

**Mál viðvíkjandi ískoytisfrágreiðing til umsókn frá Havsbrún um byggiloyvi til fóðurgoymslubygning.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá EM Ráðgeving, dagfest 08. august 2016 fyri Havsbrún, har víst verður til umsókn um byggiloyvi, og til byggiloyvi, dagfest 17. mars 2016, umframt samskifti annars í hesum sambandi.

Sambært avtalu verður eisini send ein ískoytisfrágreiðing.

Í sambandi við viðgerð av byggiloyvi til fóðurgoymsluna hjá Havsbrún vórðu ásett ávís brunakrøv. Fyritreytin fyri hesum var, at ein frágreiðing frá brunaráðgeva, har brunavirði á fóðri varð sett til at verða tað sama sum á t.d. korni.

Eftir hetta eru gjørdar brunaroyndir av laksafóðri, sum vísa, at tað er ógjørligt at fáa eld í fóðrið. Í hesum sambandi verður víst til ískoytisfrágreiðingina hesum viðvíkjandi.

Ískoytisfrágreiðingin leggur upp til, at bygningurin ístaðin fyri at verða sprinklaður, verður deildur í tvær sektiónir, sum víst á viðsendu brunatekning, solieðis at ásett brunakrøv verða fylgd.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 15. september 2016, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður galdandi sambært ískoytisfrágreiðingina frá EM Ráðgeving vegna Havsbrún.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Atli Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 63/2016.**

**Uppskot til leigusáttmála fyri mjølgoymslu hjá Havsbrún.**

Vinnunevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini til leigusáttmála millum kommununa og P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239l undir mjølgoymslu á havnarøkinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 14. september 2016, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála partanna millum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá vinnunevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Atli Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 64/2016.**

**Uppskot til leigusáttmála fyri manningarhús hjá Havsbrún.**

Vinnunevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini til leigusáttmála millum kommununa og P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239b undir manningarhúsi á havnarøkinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 14. september 2016, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála partanna millum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá vinnunevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Atli Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 65/2016.</u>**

**Verkætlan um fríðkan av Hellubygd.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Frits Eið, dagfest 22. august 2016, har hann vendir sær til kommununa um loyvi at gera eina verkætlan um fríðkan av Hellubygd.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 15. September 2016 og varð samtykt at taka undir við, at Frits Eið ger hesa verkætlan, soleiðis at alment WC og ruskpláss er við í ætlanini.

Málið verður lagt fyri býráðið til kunningar.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við verkætlanini hjá Frits Eið um fríðkan av Hellubygd, somuleiðs sum alment WC og ruskpláss verður tikið við í ætlanini.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Atli Larsen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Jann N. Toftegaard

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen